# TILTØK

**Gudstænasta 2. august**
**Havnar kirkja:** Kl. 11, Bjarni Bæk
**Hoyvíkar kirkja:** Kl. 11 Henning Bøgesvang
**Kollafjørður:** kl. 11, Theodor E. D. Olsen
**Gøta:** kl. 11, Martin R. Jacobsen
**Christianskirkjan:** kl.11.00, Lestur
**Húsar:** kl.11.00, Hanus á Gørðum, altarg.
**Mikladalur:** kl.12.15, Hanus á Gørðum, altarg.
**Svínoy:** kl. 12, Elsa Funding
**Hattarvík:** kl. 17, Elsa Funding
**Kirkja:** kl. 19, Elsa Funding
**Tvøroyri:** kl.11.00, Símun Jacobsen

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit. www.katolsk.fo

**Hebron á Argjum**
Mikudag 29. juli
Eingi tiltøk í Hebron vegna Ólavsøkuna
Sunnudag 2. august
Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Syngja við børnunum - síðani barnaansing meðan møtið er
Kl. 12.15: Møti - Jórun og Kalli greiða frá um arbeiði millum sigoynarar í Rumenia
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Ebenezer**
Týsdag
kl. 21.00 Útimøti
kl. 22.30 Opið hús
Mikudag
kl. 10.00: Møti – Talari: Rodmundur í Liða
kl. 21.00 Útimøti
Leygardag
kl. 20.00 Ungdómsmøti – Talari: Niels Pauli Nónstein – Evni: Er Gud órættvísur?
Sunnudag
kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans – Talari: Absalon Absalonsen
kl. 18.00 Evangeliskt møti
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Samkoman við Marknagil**
**Skúlaheimið, Marknagilsv.75**
Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið**
**Tróndargøta**
Í kvøld kl. 20 bønarmøti.
Ólavssøkuaftan kl. 18 sangløta.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti Stephen Dulwich talar.
Mánakvøldið 3. aug. kl. 20 bønarmøti. www.gospel.fo

**Fríkirkjan Oasan**
**Kirkjustræti**
Mánakvøldið kl 20.00 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Filadelfia**
**Landavegur 22**
Mánadagin kl. 20.00

**Tórshavnar Hvítusunnu-samkoma**
Eingi møti vegna summartíð. Møtini verða aftur 9. aug.

**Fríkirkjan Oasan**
**Kirkjustræti**
Mánakvøldið kl 20.00 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøld kl. 20: Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Eydnuhjól til frama fyri húsið, byrjar leygarkvøldið 1. august kl. 18.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Tilhaldið í Tórsgøtu, tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 9-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Tilhaldið verður afturlatið til Ólavsøku. Gott summar.

**Ólavsøkan 2009**
28. 29. 30. juli kl. 16–20
Kjallarin: Listaframsýning av hornlutum, Rasmus Nygaard, Inngongd frá Grasagarði
Miðhæddin: Ólavsøkukafé
*Øll eru hjartaliga vælkomin.*
*Opið hús. Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin*

**Pensionistafelagið í Havn**
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Summarsteðgur er, og vit hittast aftur 9. september.
Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo

**Eldrafelagið Nón**
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur summarsteðg. Lýst verður, tá tað letur upp aftur.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
Hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.***

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið: Súnfríð 316167, Ella 316261, Daisy 312498, Paulina 510677, Henry 272800.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015 - 110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**ADHD-felagið**
Róhild tlf. 281860/311861, e-mail: bjarta@olivant.fo, Unn tlf. 224253/444053, Petra tlf. 235191/449922 og Harriet tlf, 218053/448053

**Sjálvhjálpin**
tlf. 280005 mán.-fríggjadag kl. 12-16 og mik. 16-18.
www.sjalvhjalpin.fo

**Listasavnið á Sandi**
Listasavnið er opið týsdag til sunnudag kl. 14 - 16.
Mánadag er stongt

**Sandoyar Kunningarstova**
Sandoy Tourist Information Centre - Mørkin Mikla 3kj, 210 Sandur. Skrivstovan er opin mánadag til fríggjadag kl. 09-12 & 13-16. Tlf. 361836. www.visitsandoy.fo

**Listasavnið á Sandi**
Listasavnið á Sandi er opið hvønn sunnudag kl. 14-16.

**Stoffskiftisfelagið**
*Millum Gilja 111 - Hoyvík*
Les meira á stoffskifti.com

**Djóraverndarfelagið, tlf. 504533**
*postsmoga 1365, Tórshavn.*
dvf@dvf.fo

**HUFF, Hundaeigarafelag Føroya**
*limur í Dansk Kennelklub, kreds 12.*
Telefonin hjá felagnum er: 277317. Til ber at tekna seg sum lim og spyrja um eitthvørt viðv. hundum.
Hvørt týskvøld kl. 19.00 ganga vit túr, møtast við Skógrøkt Landsins.

**Giktafelag Føroya**
**MBF-húsið**
*Íslandsvegur 10c - 100 Tórshavn*
Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13.00 til 16.00.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48 D, 8000 Århus C
www.aarstova.dk

**Cøliakifelag Føroya**
Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783.

Hjartafelagið
Postboks 3120, 110 Tórshavn, hjartafelag@hjartafelag.fo

**Kvinnuhúsið**
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10 - 17. Tlf. 31 72 00 svarar alt samdøgrið.
post@kvinnuhusid.fo
www.kvinnuhusid.fo

**Frítíðarfelagið »Antares«**
*Postsmoga 11, 490 Strendur*
Frítíðarfelag hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum ið starvast í altjóða farma- og frálandavinnu. Meira fæst at vita við at venda sær til Felagið á tlf. 590100, ella um teldupost aldebaran@kallnet.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*MBF-Húsið - Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld.

**Hundahvølpar**
Hvølplar av Bitchon Havanais slagnum til sølu. Ættartalva fylgir við.
**Tlf. 555098**

**Hundahvølpur**
2 mðr. gamal, (mamman golden retriever, pápin border collie), verður latin djoravini. Áhugað kunnu ringja og hoyra meira.
**Tlf. 317767**

# MERKISDAGAR

**Prógv**
Herit Bentsdóttir Albinus, Tvøroyri, hevur tann 17. juli 2009 lokið prógv á London School of Economics (LSE), sum master í Econometrics and Mathematical Economics (Búskaparfrøðingur).

**Prógv**
John Johansen, Trongisvágur, er útlærdur í dag, á Hotel Føroyum sum hotelkokkur. Lærumeistari var Gundur Fossdal.

**Prógv**
Týsdagin 14. juli vóru Tóra Winther Reinert og Eirikur Danielsen uppi til teirra seinastu próvtøku á Fróðskaparsetrinum, har tey seinastu trý árini hava lisið lívfrøði á Náttúruvísindadeildini. Próvtøkan var framløga av eini bachelorverkætlan, sum tey hava arbeitt við seinastu 17 vikurnar. Verkætlanin ber heitið "Effects of Various Nutrient Compositions on Phytoplankton Cultivation" og snýr seg um, hvussu best er at framleiða plantuæti, at nýta sum føði til aling av toskalarvum.

**85 ára føðingardagur**
Ólavsøkudag 29. juli verður Hildegerd Højgaard, Rituvík 85 ár. Dagurin verður hildin á Sjókaféini í Runavík frá kl. 13 til 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**60 ára føðingardagur**
Tann 30. juli verður Johan Eli Ellendersen 60 ár. Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshúsinum. Tey, ið ynskja at gratulera, eru vælkomin frá frá kl. 19.

**Gullbrúdleyp**
Mánadagin 3. august hava hjúnini Nansy og Niclas Thomasen, Vágur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Jónsborg leygardagin 8. august frá kl 19, har øll eru vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Ólavsøkuaftan 28. juli, hava hjúnini Marjun og Sigmundur Olsen, Porkeri, silvurbrúdleyp. Opið hús verður í heiminum á Hólavegi 11 frá kl. 17, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 10. august hava Gertrud og Kalli Váðklett silvurbrúdleyp. Daguri verður hildin í Bygdahúsinum í Lorvík kl. 18.00. Tey ið vilja gleða okkum at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 21 53 31 innan 5. august.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 8. sept. hava hjúnini Kirstin og Helgi Djurhuus í Havn verið gift í 25 ár. Veitsla verður hildin í B36 húsinum leygarkvøldið 12. sept. kl 19.00. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf 217254 (Kirstin) ella aftaná kl. 18.00 317054 (heima) innan 30. aug.

**Brúdleyp**
Hósdagin 30. juli kl. 13 giftast í Betesda Ásvør Dam Lassen og Pætur Steinberg. Brúdleyp verður fyri innboðin á Soli Deo Gloria kl. 18.

**Brúdleyp**
Leygardagin 1. aug. giftast Arnhild Johannesen, Kaldbak og Martin Matras Schmidt, Viðareiði. Vígslan verður í Nazaret í Kaldbak kl. 13. Aftaná vígsluna verður móttøka, har høvið verður at hitta brúðarparið og fáa ein drekkamunn. Øll eru vælkomin. Veitslan verður um kvøldið fyri innbodnum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 1. august kl. 15 giftast í Havnar kirkju Ingibjørg Hansen úr Gøtu og Torleik Mortensen úr Keypmannahavn. Veitsla verður hildin fyri innbodnum í B36 húsinum kl. 18. Brúðarhús verður hildið í Gøtugjógv sunnudagin 2. august frá kl. 17, har øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 1. august klokkan 14 giftast Daisy Færø og Edvin Hansen, bæði úr Klaksvík. Vígslan verður í Betesda klokkan 14. Eftir vígsluna verður móttøka, har høvið verður at heilsa upp á brúðarparið. Øll eru vælkomin. Veitslan verður um kvøldið fyri innbodnum í Bakkastovu.